**Røða hjá Poul Geert Hansen, aðalstjóra, í sambandi við, at Mentanarhøllin á Eiði var tikin í nýtslu sunnudagin 18. september 2016**

Góðu eiðisfólk, góðu áhoyrarar,

Fyrst fari eg at ynskja Eiðis kommunu og tykkum øllum hjartaliga til lukku við nýggju mentanarhøllini.

Ein kommuna, sum ger íløgu í mentan, er ein framsøkin kommuna.
Ein bygd við einari mentanarhøll er ein bygd, sum virðir sínar íbúgvar.

Bretski forsætismálaráðharrin, Winston Churchill, verður onkuntíð siteraður fyri at hava sagt: "Hvat skulu vit so berjast fyri?", - - tá onkur skjeyt upp, at játtanin til mentan skuldi skerjast fyri at fíggja kríggið móti Hitler.

Mentanin er tað vit liva fyri, bæði tann einstaki og samfelagið sum heild.

Ullin var kanska einaferð Føroya gull, men tað er øll mentanin, sum er knýtt at ullini, sum er stolti arvur okkara, og hóast hjallurin framvegis er í sjónum, so vita vit, at mentanin ikki longur bara er tað vit liva fyri, men eisini er nakað, vit kunnu liva av.

Ein kommuna, sum ger eina íløgu í mentanarbygging, hevur tí ikki bara gjørt eina marglætisíløgu, men eina íløgu í framtíðina.

Eiði er ikki einans kend fyri sítt vinnuliga framtaksemi, men eisini fyri sín sterka mentanarliga arv. Tað er í hesi bygdini, at føroyska myndlistin hevur sínar røtur. Tað var her, at amerikanska myndlistakvinnan Elisabeth Taylor vitjaði og gav unga føroyinginum Niels Kruse íblástur. Tað er haðani, at undangongumaðurin innan føroyska fotolist, Ásmundur Poulsen, er ættaður. Og tað er her, at føroyska myndlistin framvegis livir sítt fríska lív í hugtakandi atelierinum hjá Sigrun Gunnarsdóttir.

Tað er kanska ikki so løgið, at myndlistin stendur sterk á Eiði. Tit hava Flógvan, Risan og Kellingina, Kollin og Slættartind. Men tað er ikki náttúran einsamøll, sum kveikir okkum. Vit kveikjast í minst líka stóran mun av hvørjum øðrum, av at síggja hvønn annan arbeiða og síggja listarligu úrslitini hjá hvørjum øðrum.

Mentanarligt arbeiði kann vera eitt einsligt arbeiði, men tað krevur samveru við onnur, og tað verður styrkt í einum felags umhvørvi.

Tí ger tað mun at byggja góðar karmar. Tað síggja vit eisini í ítróttalívinum. Tit eiga kanska Føroya vakrasta fótbóltsvøll, tit hava lagt eitt stórt arbeiði í fótbóltin, og úrslitini kenna vit. Og vit vænta heilt víst, at tit eru við aftur í bestu deildini næsta ár.

Góðir karmar gera mun, men góð úrslit krevja eisini harða venjing og gott samanhald. Soleiðis er í ítróttinum, og soleiðis er eisini í mentanarliga arbeiðinum.

Við nýggju mentanarhøllini hava tit fingið fimm nýggj venjingarhøli. Og tit hava fingið ein stóran sal til framførslur, fyrilestrar og filmsýning.

Tónlistarligi arvurin, sum millum onnur Eiðis ljómfelag, legði lunnar undir, fær við hesum betri lív laga.

Vaksandi ferðavinnan fær fleiri mentanartilboð í kommununi, og eitt virkið fornminnisfelag fær somuleiðis góðar framløgukarmar.

Mentamálaráðið fegnast saman við tykkum. Líkindini at menna seg listarliga eru nú vorðnar upp aftur betri hjá ungfólki á Eiði. Bæði sum einstaklingar og saman við øðrum. Og vit gleða okkum at síggja, hvussu tit fara at nýta karmarnar, og hvørji úrslit fara at spyrjast burturúr. Ikki bara til gleði fyri bygdafólkið í teimum trimum bygdunum í Eiðis kommunu, men fyri samfelagið alt.

Landsstýriskvinnan Rigmor Dam letur heilsa og ynskir tykkum blíðan byr og takkar fyri, at Mentamálaráðið var boðið við til hátíðarhaldið.

Hjartaliga til lukku!